## Grønland undir umsiting

Donsku politikararnir kunnu ikki góðtaka, at børn í Grønlandi liva undir korum, sum eru merkt av kynsligum ágangi, fátækradømi og svongd, og tí eigur Fólkatingið at seta grønlendska heimastýrið undir umsiting. Tað segði Pia Kjærsgaard, formaður í Danska Fólkaflokkinum, við grønlendska útvarpið fyrrakvøldið. Hon er bara ein av teimum donsku politikarunum, sum hava fýlst á viðurskiftini í Grønlandi eftir sendingina „Flugten fra Grønland“.



## Skipaskrá útsett

Íslendska stjórnin ætlaði, at ein lóg um eina altjóða íslendska skipaskráseting skuldi koma í gildi nú um ársskiftið, men nú hevur stjórnin gjørt av at úseta gildiskomuna eitt ár, skrivar Vísir. Sjálv lógin varð samtykt í Altinginum í vár. Endamálið við henni er, at handilsskip hjá íslendskum reiðaríum skulu skrásetast í Íslandi og sigla undir íslendskum flaggi, samstundis sum ætlanin er at fáa útlendsk reiðarí at skráseta síni skip í nýggju skrásetingini.

# Fyritøkur eru væl nøgdar við FaroExpo 2007

**Eftirmetingar, ið gjørdar eru fyri hvørja einstaka fyritøku, sum var við á FaroExpo, vísa, at bæði føroysku og útlendsku luttakararnir eru sera væl nøgdir. Nú er Sp/f Virkisráðgeving, sum samskipar vinnustevnuna, longu farin undir at fyrireika FaroExpo 2008**

VINNULÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá ið hurðarnar á altjóða vinnustevnuni FaroExpo 2007 lótu aftur í Runavík, og formella tiltakið soleiðis var av, fóru útlendsku luttakararnir eitt nú at vitja føroysku fyritøkurnar, ið tær høvdu fundast við á vinnustevnuni.

FaroExpo er skipað sum partenariat, har fyritøkurnar, sum eru við, fundast við hvørja aðra á vinnustevnuni eftir fastari skipan og tíð.

Á stevnuni kann hvør fyritøka hava í mesta lagi 16 fundir.

Stevnan byrjaði í Runavík mánakvøldið 29. oktober við ”get-together” í hølum hjá Eik Banka í Saltangará. Runavíkar kommuna var vertur hetta kvøldið og borgarstjórin, Hans Jacob Lamhauge, bjóðaði luttakarunum at vera vælkomnum til Runavíkar kommunu og til vinnustevnuna.

### Partenariat

Týsmorgunin 30. oktober setti so Jóhan Páll Joensen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag, FaroExpo 2007 í ítróttarhøllini í Runavík. Kórið Vox Angelica undirhelt við hátíðarligum og vælljómandi sangi, og morgunmatur var at fáa á matarstaðnum í høllini, sum var hugnaliga pyntað.

Eftir setanina byrjaði partenariatið, sum vardi til kokkan 11.30 hendan dagin.

Tær 45 luttakandi fyritøkurnar leitaðu sær út til básarnar, har fyrstu fundirnir skuldu byrja.

Fyritøkurnar høvdu fingið eina fundarætlan útflýggjaða við í miðal 14 viðkomandi fundum, sum fyritøkurnar sjálvar hava ynskt.

Partenariatið, sum helt fram allan dagin eftir, eydnaðist væl, og luttakararnir vóru sera væl nøgdir.

### Fyrilestrarnir

Ráðstevnuparturin av FaroExpo var í Kelduni í Skálafirði, har fýra áhugaverdir fyrilestrar vórðu hildnir.

Evnini vóru evropeisk og altjóða rák innan laks og hvítan fisk, privatisering av almennum fyritøkum, managing people – managing business og keyp og søla av fyritøkum.

Til ber at finna fyrilestrarnar á heimasíðuni www.faroexpo.fo.

Tá ið formelli parturin av vinnustevnuni var liðugur mikudagin 30. oktober, vórðu allir luttakararnir bjóðaðir á gallaveitslu, har nógv spennandi mentanartiltøk vóru á skránni.




*Morgunmatur er á FaroExpo. Umhvørvið er hugnaligt, og væl er pyntað*



*Eftir formellu tiltøkini varð skipað fyri gallaveitslu fyri luttakarunum*

### Vælnøgdir luttakarar

Føroysku og útlendsku fyritøkurnar á FaroExpo 2007 vóru sum heild sera væl nøgdar við vinnustevnuna.

Sambært Virkisráðgevingini hava fleiri sagt frá ítøkiligum úrslitum.

- Nøgdsemi kann metast út frá eftirmetingunum, ið eru gjørdar fyri hvørja einstaka fyritøku, sigur felagið.

Sp/f Virkisráðgeving er longu farin í holt við at tilrættaleggja FaroExpo, sum verður aftur í Runavík komandi heyst. Vinnustevnan hevur nú trý ár á baki, og nú verður so sett út í kortið til stevnuna, sum verður hin fjórða í røðini.



*Fundarvirksemið er byrjað, og hvør fundur varar í 25 minuttir*




*Umboð fyri Eik Banka vitja básin hjá El-Service*